# Ein perla av eini mynd

VÁGSBOTNUR
*Jákup Lindenskov*




*Vágsbotni fyri umleið sjeyti árum síðani. Myndina tók Niels Juel Nielsen úr Havn, og stóð hon í Hvem Hvad Hvor í 1949. Hetta var handilin hjá Zacharias Heinesen í bygninginum, sum nú hýsir Miðlahúsinum hjá Sosialinum*

HVEM HVAD HVOR árbókin hjá Politikken 1950, sum varð prentað í sept/okt. 1949 í 125.000 eintøkum, hevði hesa myndina við tekstinum »Typiskt parti fra Thorshavn« í partinum um Føroyar.

Nú Sosialurin er fluttur í rúmsáttu húsini, sum hava húsað stórhandlum í øldunum við 1700 - 1800 - 1900 - og 2000 talinum, samtykkja vit neyvan, at hetta er »typiskt parti fra Thorshavn«, heldur gimsteinurin, ið ber boð um serligu evnini hjá havnarmanninum, Niels Juel Nielsen (1911-1980) at taka myndir, sum veita komandi ættarliðum innlit í farnar dagar.

Spurdi Trúgva Árting, nær heim teirra á heygsbreyt varð bygt - og greiðir hann frá, at Dáva Tummas gjørdi grundina í 1938, Cl. Dalsgaard og Jakki í Fuglafirði smíðaðu húsini, tey fluttu inn um ársskiftið 1939/40.

Hyggja vit at ovaru húsarøðini við Heygsbreyt eru húsini f. v. : hjá Johan á Lag, Hans á Lag, Johs, Thomsen og niðan fyri Johs. Thomsen eru húsini hjá Elisabeth í Sandágerði, tey hava flata tekju og eru í einari hædd, síðani hjá Jacob Midjord og niðanfyri eru húsini hjá Grækaris, sum standa í Brekkugøtu _ húsini við árstalinum 1924.

Sostatt er myndin eldri enn húsini hjá Jóannes Árting, sum hann fór undir at byggja í 1938.

Berint í Árnafirði er maðurin við hvísl ella spaka niðan fyri bátarnar, hann var ruddingarmaður hjá kommununi _ væl beindi hann burtur rusk o. a. t. sum skolaði upp úr sjónum.

Tann lítli bilurin framman fyri handilin hjá Andreasi og lastbilurin við byggitilfari, hvør kann siga okkurt um teir?

# Stórt virksemi í Vágsbotni síðani 1767

**Handilshúsið Rosenmeyer og Floor hevði sum umboðsmenn fyri stórkeypmannin Ryberg í Keypmannahavn handil í Føroyum frá 1767 til 1790, og vóru hús teirra bygd í Vágsbotni í Tórshavn. Har vóru bæði sethús, pakkhús, tubbaksspinnarí o. s. fr. Bøkjarameistarin hjá teim, Quilliing, bygdi sær hús, har nú Quillingsgarður stendur, og var eisini stórt bøkjarí**

VÁGSBOTNUR
*Jákup Lindenskov*



*Vágsbotnur um fyrra aldarskiftið. Her hevur nógv handilsvirksemi verið í fleiri øldir. Umboðsmenninir hjá Ryberg byrjaðu virksemi í Vágsbotni í 1767. Í dag hýsir gamli Vágsbotnshandilin Miðlahúsinum hjá Sosialinum*

Teir løgdu veg úr Vágsbotni upp á Bryggjubakkan og eftir Bryggjubakkanum gjøgnum Bringsnagøtu yvir í Quillingsgarð. Tann brúgvin, teir gjørdu yvir um Havnará, var tann fyrsta, ið løgd varð um ánna.

Vegurin úr Vágsbotni út á Runding var eisini gjørdur í hesari tíðini. »Rundingin« brúktu teir til ríðibana, í »Álkakeri« høvdu teir skjótibana, og har var eisini bygt eitt lysthús.

Um »Vágsbotnshandilin« skrivar J. C. Svabo m. a. í sínum »Indberetninger« 1782-83:

»Oplaget eller Kompagniets Handel er anbragt paa den vestre Bugt af Thorshavn, som nu kaldes Frederiksvaag. Om denne bemærkes, at Hr. Conferenceraad Ryberg er erholt, under 29. April 1766 Prevelegium i 10 Aar at bringe fra Kjøbenhavn til Frederiksvaag og til Udførsel at oplægge alle slags asiatiske Varer saavel som her raffinerede Sukre, item Rom og Tobak fra de kongelige danske Ejlande i Amerika, imod at betale ved Varens udførsel fra Færø 1 pro Cent af Værdien til Kongen.

Dette Prevelegium blev under 26. April 1768 saaledes udvidet, at han til Færø maatte indføre og der oplægge alle Slags Brændevin og Likør fra Frankrig og Spanien, alle Slags asiatiske Varer fra Frankrig, England og Holland, og alle Slags Tobak i Blade eller spunden fra England og Skotland og den Tids engelske Kolonier i Nordamerika til Bergen og derfra til Færøerne til videre Udførsel.

Under 30. Juli 1771 er det blevet ham tilladt tillige at anlægge et Oplag i Trangisvaag paa Suderø.

Ryberg fik Tilladelse til at lade en Bødker fra England nedsætte sig i Færø for at lære Haandværket fra sigitem saadan Bødkermester ved Navn Quillin er den bosiddende. De Varer som foruden ovenmeldte indføres tl Oplaget, er fin The, Porceilæn, Genever, alle Slags Vine, Silketorklæder o. l.

Udførelsen sker fornemmelig med smaa Slupper og Bughers, og Stederne, hvorfra de ankommer, er især: Levis, Rush, Aire, Porto, Hetland, Orcades, Galloway, Cathyness, Fortwilliams, Grenock, Isle of Man, Limeriik m. f,.

Indførelsen er sket hidtil fornemmelig ved 3 af Kompagniets egne Skibe fra Bergen. Al Oplagets ind- og udgaaende Skibe have undertiden ligge5t 12-14 paa Havnen paa engang.

Der er ved denne Handel 16 til 18 Bødkere mest Skotter, de øvrige Færinger, som have lært ved oplaget og Danske, der arbejde hele og halve Ankere for Udførsel.

En Del av Throshavns indbyggere bruges som Daglejere ved denne Handel, hvoraf nogle for bestandig antaget. Ved denne handel ere 2 Tobaksspindemestre, der have nogle færøske Drenge i Lære.

Ved Kom pagniet ere store pakhus og eftir Færøs lejlighed meget smukke Vaaningshuse af Træ. Desuden har Oplaget gode Tove til Brug for de ankommende Skibe, som kunde mangle dem og en kostbar Brugge for bekvem udlosning. Det har indrettet de fornødne Ringe for Landtove paa Bygten, og skal 1782 paa Nolsøen have oprettet et Slags Fyr for dew ankommende Skibe.